Atli Dam, løgmaður, um fólkaflokspolitikkk:

Ábyrgdarleyst atkvøðufiskarí

Fólkaflokkurin rekur ein liberalistiskan politikk upp á kvamsvís. Teir vilja sleppa at brúka landskassan júst, sum teir vilja, fyri so at geva fólki fatan av, at vit hava eitt rentabult og frítt vinnulív, sum stendur seg í kappingini sigur Atli Dam í eini viðmerking til seinastu skrivingina í fólkafloksmálgagninum og til fólkafloksins støðu til alment veðhald og studning til vinnu sum er rakt av trupulleikum.

— Vit hava so einki ynski um at fáa undirskotsgevandi fyritøkur inn undir landskassan leggur hann aftrat.



— Vit hava als einki ynski um at sosialisera skip, sum ikki hava kunnað klárað seg frammanundan. Einki skilagott er í, at landskassin tekur slíkt stig, sigur Atli Dam, løgmaður, í eini viðmerking til skrivingina í málgagni fólkafloksins um lagnuna hjá parti av farmaskipaflota okkara. Hann ger annars eisini viðmerkingar til støðu floksins til almenna veðhaldspolitikkin og stuðulslán yvirhøvur.

— Skuldu vit gjørt nakað við almennari luttøku, so skuldu vit heldur havt skipað tað sjálvir frá byrjan av, sigur hann, og vísir hervið aftur agitatiónini frá fólkaflokkinum um, at hetta landsstýrið hevur ynski um at fáa farmaskipaflotan inn undir tað almenna.

Og hann heldur fram:

— Skuldu vit roynt at bjargað umrødda vinnuvegi í eina tíð, soleiðis at vanlig feløg kundu yvirtikið skipini aftur, so vildi tað verið meira rættvíst mótvegis skattgjaldarunum, sum tá vera eigarar av skipunum, at tey vóru í einum blandaðum felag í eina tíð. Bara at strika skuld hjá privatum og so lata teir somu halda fram man kennast løgið hjá skattaborgarunum, sum eru teir, sum rinda gildið og sum eiga.

Atli Dam heldur tí lítið um fólkaflokkin, tá tað snýr seg um veðhald og stuðul frá tí almenna.

— Men hetta er so einki nýtt fyri fólkaflokkin, sum jú leingi hevur vist, at hann rekur liberalistiskan politikk uppá kvamsvís.

— Ein skal sleppa at brúka landskassan sum ein vil og so aftaná kunna geva fólki ta fatan, at tað er talan um eitt rentabult og frítt vinnulív, sum klárar seg í kappingini, sigur hann.

Atli Dam vísir annars á, at landsstýrið longu hevur »strammað« í veðhalds- og stuðulspolitikkinum fyri júst at forða fyri, at fólk ikki fara út í ov vágiligar íløgur.

Flestu av veðhaldunum, sum nú eru vorðin effektiv, eru veðhald, sum vórðu givin undir undanfarna landsstýri.

— Annars fara vit fyrsta dagin at leggja uppskot fram um stuðul til endurnýgging av fiskiskipaflotanum, sum avmarka møguleikan at fara undir projekt uppá eitt óforsvarligt grundarlag.

— Hvat viðvíkur fólkafloksins politikki í hesum spurningum, so er talan um ábyrgdarleyst atkvøðufiskarí og einki annað, sigur løgmaður at enda.

jan

Framhald av síðu 9

alt tí at verða gjørt til tess at fáa bretar at sleppa hesari ætlan.

Nevndin heldur eisini, at tað er umráðandi, at føroyskir myndugleikar í framtíðini fylgja væl við tí, sum hendir við havumhvørvinum ikki bert um okkara leiðir, men eisini í Norðsjónum.

Nevndin er út frá frammanfyristandandi sannførd um, at føroysk áhugamál eru best vard við, at EDRP-ætlanin ikki verður sett í verk og heldur nevndin tað tí vera beint at mæla løgtinginum til at áleggja landsstýrinum at gera enn meira til tess at steðga nevndu ætlan. Nevndin kemur tí við uppskoti til samtyktar samsvarandi hesi støðu.

Uppskot til samtyktar

1) Álagt verður landsstýrinum at virka ímóti EDRP-ætlanini í Dounreay á øllum teimum økjum, har hetta er møguligt eitt nú við, at landsstýrið tekur upp aftur hetta mál í Norðurlanda Ráðnum, yvirfyri donsku stjórnini og yvirfyri bretsku stjórnini.

2) Álagt verður landsstýrinum at taka upp samband við myndugleikarnar í hinum norðatlantisku samfeløgunum, eitt nú Hetlandi, Orknoyggjunum, Íslandi, Grønlandi og Noregi til tess at samskipa mótstøðuna móti EDRP-ætlanini í Dounreay.

3) Álagt verður landsstýrinum at bera so í bandi, at sjógvurin kring Føroyar og luftin javnan verða kannað fyri geislavirkni.

4) Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til eina tilbúgvingar og bjargingarætlan, at seta í verk, um so er, at kjarnorkuvanlukka skuldi hent við vanda fyri Føroyar.

5) Álagt verður landsstýrinum sinámillum ávaringarskipan, um so at ein kjarnorkuvanlukka skuldi hent við vanda fyri føroyska samfelagið.

Umhvørvisnevndin,
17. februar 1988.
Jóannes Dalsgaard
Hans Jacob Debes
Øssur av Steinum
Anfinn Kallsberg
Eilif Samuelsen



DAGBLAÐ

23 - 54. ARG. FRIGGJADAGUR 26. FEBRUAR 1988

Restin av farmaflotanum:

Á heysin ella sosialiserast

Undir orðaskiftinum á løgtingi um at bjarga Helenu — og leinum bátinum Svani og Óluvi Gregersen — kom týðuliga fram, at landsstýrið umhugsar at sosialisera frystifarmaskipini.

Fyrradagin hevði løgtingið fyrstu viðgerð av uppskotinum frá Sonna Jacobsen og Svend Aage Ellefsen um at bjarga frystifarmaskipunum Helenu undan tvingsilsølu. Orðaskiftið var rættiliga livligt og fevndi bæði um onnur frystifarmaskip og serliga skipini, sum longu eru keypt á heysin av vitandi mongrunni.

Lagmaður gjørdi vóðuliga vart við, at talan bert er um tvey møguleikar hjá hesum skipum. Annaðhvørt fara tey undir hamarin, ella verða tey keypt mó undir eitt landsráðarí, har heu trý nevndu skip verða innlimað til tess at taka skandinaviska, europeiska og amerikanska marknaðin. Tá á heysin ella sosialiserast.

Vert varð gjørt við, at landsstýrið ... skandinaviska kundi lata skipini frá sær ... men tað veg una lenna vart at.

ÓNGIN VILJI

Hetta eru somu tankar, ið løgu aftanfyri viðgerðina av gass- og lemskaliv tankaskipunum. Skipini skuldu á heysin, ella maru skuldi landsstýrið vera á tinnum betalnóta ella gagnum ... eitt holding felag.

Landsstýrið sigur seg sum altíð vera positivt. Men landsstýrið vil fúlt vart, at hósast sær ... frysta allan kapitalin, sum landsstýrið ... missa við eitt tvingsils- sølu, so er tað ikki nóg mikið. Men vil vita ... at vera lítið skal til aftrat ... til tess at bjarga skip ... uttum.

Men hesa leinir leggur landsstýrið eisini í, tí ... verða skipini framvegis ... privatum. Sundum tað ger tað umaa, um landsstýrið bjóðar 3- til ella 17 miljónir, so leingi sum ikki bjóðin tað, ið nevndir er til tess at leysa skuttu lá ... tilkortaðan.

KUNNI KLARA SIG.

Lotsi landsstýrið skuttu likviditetsmøguleikunum og ... tryggjar landsstýrið ... til tað almennu, so kunna ... skipini ... allaun ... um at verða fær fyri at bera restandu skuld og avskriva ... skuld ... rakstrarlopið, aftan á ... rakstrarkostnaðin.

Hjá Helenu vóru 8 mil ... Tað er alt. Spurningurin er ... skriva ... veðhald upp ... 17 miljónir og ... 10, ella vera ... at 8 miljónirnar ... 15%, vekstur ... frakstrarlutum ... at ... skip fara at bera ... tapinum.

Lesið um ítrótt í sosialinum



TRYGDIN



er BILBELTIÐ